# Ongin kann taka meistaraskapin frá Páll Fanga

**ÓLÓGLIGUR KAPPRÓÐRARBÁTUR**

Róðrarsambandið fer ikki at broyta avgerðina um revsingina til Páll Fanga, tí hann kann ikki fáa harðari revsing, sigur formaðurin í Róðrarsambandinum

Áki Bertholdsen

- Tað kemur ikki upp á tal, at Róðrarsambandið fer at broyta avgerðina.

Tað staðfestur Jan Herman Hansen, formaður í Róðrarsambandinum.

Róðrarsambandið ásannar annars, at Páll Fangi hevur róð ólógliga í minst tveimum stevnum í ár.

Afturfyri tað verður hann revsaður við tveimum gulum kortum, sum als ongan týdning fáa, tí Páll Fangi hevur framman-undan vunnið allar stevnunar og sostatt hann longu Føroyameistari.

Og tað meistaraheitið fer Róðrarsambandið ikki at taka frá honum.

- Vit hava heilt einfalt ikki heimild til at revsa Páll Fanga staðfestir formaðurin.

Hann sigur, at tað er enntá meiri enn ivingarsamt um Róðrarsambandið hevur heimild til at geva Páll Fanga so frægt sum tey bæði gulu kortini, hann hevur fingið.

- Tiansheldur hava vit heimild til at taka stig frá honum og enn minni hava vit heimild til at kolldøma hann.

## Bundin á hond og fót

Upp á ein beinleiðis fyrispurning, viðgongur Formaðurin í Róðrarsambandinum, at hann hevur eitt sindur ringt við at hugsa sær, at so royndir rógvarar sum teir á Páll Fanga, hava verið í góðari trúgv í hesum máli.

- Eg haldi, at teir væl hava vitað av, at tað er ólógligt, sum teir hava gjørt.

Men kortini kann Róðrarsambandið onki gera.

Jan Herman Hansen sigur, at stóri trupulleikin er, at tað er ongin klaga komin um Páll Fanga.

- Eftir hvørja stevnu hava rógvarar tveir dagar at kæra um viðurskifti í róðrinum, men ongin kæra er komin um Páll Fanga og tí fær Róðrarsambandið onki gjørt.

- Men eftir at vit fingu eina fráboðan beint uppundur vestanstevnu, hava vit kanna myndatilfar frá stevnunum í ár og hava funnið prógv fyri, at Páll Fangi hevur róð ólógliga í minst tveimum stevnum.

- Men tað ber ikki til at koma afturum aftur. Hevði ein kæra verið aftaná hvørja stevnu, var støðan ein heilt onnur, staðfestir hann.

Hann sigur, at á hvørjari stevnu eru tveir høvusdómarar sum hava evstu ábyrgdina. Teir plagdu eisini kanna bátarnar, hóast tað er ikki eitt lógarkrav, at teir skulu gera tað.

Men nú barnaróðrar eisini hava verið, hevur tað eftirlitið ikki verið so neyvt, sum tað plagar.

Og tá ið teir so hava undirskrivað sína frágreiðing eftir eina stevnu, er hon avgreidd og so vendst ikki aftur - uttan so, at ein kæra verður send Róðrarsambandinum, áðrenn tveir dagar eru farnir, sum er kærufreistin.

- Skulu vit koma aftur um aftur í hesum føri, hvar skal markið so verða, spyr hann. Skulu vit eisini kolldøma onkran bát, sum hevur róð í fjør, vissi onkrar myndir brádliga koma undan kavi, sum avdúka okkurt ólógligt, spyr hann.

- Tað ber ikki til, staðfestir hann.

## Vildu ikki lata sum onki

Kortini helt Róðrarsambandið, at lógarbrotið hjá Páll Fanga skuldi ikki fara aftur við borðinum heilt óátalað.

- Tí fekk hann tvey gul kort, hóast vit helst heldur ikki hava heimild til tað, leggur hann afturat.

- Hinir rógvararnir hava ikki kunnað víst mær á nakrar aðrar reglar, sum gevur okkum heimild at revsa Páll Fanga harðari, leggur hann afturat fyri Sosialinum.

Hann skoytir upp í, at so má hetta fáa ta avleiðing fyri ólavsøkuróðurin, sum tað fáa vil.

- So leingi vit hava borið okkum rætt at eftir bestu sannføring, fáa vit ikki gjørt meir og so stendur restin til rógvararnar, sigur hann.

Um tað so endar við, at Páll Fangi rør einsamallur á ólavsøku, hevur hann tað fínt við tí, segði hann eisini við Kringvarpið í gjárkvøldið.

*aki@sosialurin.fo*

## Ólavsøkan er oyðiløgd




**ÓLÓGLIGUR LISTI**

*Hendan myndin vísir rættiliga væl, hvussu tann ólógligi listin á lærbekkinum á Páll Fanga sær út. Endamálið er, at teir aftastu rógvararnir kunnu stinga føturnar upp ímillum listan og lærbekkin fyri at halda føturnar fastar, tá ið teir taka bekktøk*

# Ólógliga broytingin á Páll Fanga

**ÓLÓGLIGUR KAPPRÓÐRARBÁTUR** Manningin á Páll Fanga hevur skrúvað ein eyka lista upp í lærbekkin og tað hjálpir teimum aftastu rógvarunum nógv, tá ið teir taka bekktøk

Áki Bertholdsen

Lógarbrotið, sum manningin á Páll Fanga hevur gjørt, er, at teir hava skrúvað ein lista upp í lærbekkin, men listin er nakrar sentimetrar upp frá bekkinum. Lærbekkurin er aftasti bekkurin í bátinum - men har situr ongin rógvari.

Teir aftastu rógvararnir sita á næstaftasta bekki, men fyrimunurin hjá teimum er, at nú kunnu teir stinga føturnar upp ímillum lærbekkin og listan so at teir betri fáa tikið á og toga seg upp aftur, tá ið teir taka bekktøk.

Tað hjálpir teimum eisini rættiliga væl at halda javnvágina og at sita væl á bekkinum, at teir fáa skora føturnar fastar ímillum listan og bekkin, tá ið teir taka bekktøk.

Hetta er ólógligt, tí tá ið Róðrarsambandið hevur góðkent ein bát, er tað ikki loyvi at gera nakað við hann, uttan loyvi frá Róðrarsambandinum og listin umborð á Páll Fanga er ikki góðkendur.

> **Vit hava onga heimild at taka stig frá Páll Fanga ella at kolldøma hann**

Rógvarar siga, at tað svarar til, at tveir mans liggja á gólvinum og gera búkvenjingar, men har annar sleppur at hava føturnar uppi undir eini ribbu og hin ikki.

Tað er eyðsæð hvør hevur ein fyrimun av hesum, siga rógvarar.

Ein royndur rógvari sigur, at hetta gevur rógvarunum ein rættiliga stóran fyrimun, serliga tá ið tað eisini snýr seg um at halda javnvágina, tá ið tað er óslætt og sjaskveður.

Hann heldur eisini, at tað er ógvuliga sannlíkt, at hesin listin hevur hjálpt Páll Fanga at vinna róðrarnar. Hann sigur, at verður hugt eftir teimum stevnum, sum hava verið, er tað serliga tá ið teir taka bekktøk í startspurtinum og í endaspurtinum, at Páll Fangi hevur vunnið sínar róðrar - burtursæð frá á Vestanstevnu, tá ið ongin listi var í bátinum.

*aki@sosialurin.fo*

# Avgerðin ikki broytt

Róðrarsambandið fer ikki at broyta avgerðina um einans at revsa Páll Fanga við tveimum gulum kortum.

Jan Herman Hansen, formaður, staðfestir, at tað hevur sambandið ikki heimild til.

Kortini fer nevndin at taka áheitanina frá 11 seksmannaførum til eftirtektar um at taka málið upp til nýggja viðgerð.

Í hesum sambandi fer Róðrarsambandið helst at hava fund um málið í kvøld.

Men hvat skulu tit hava fund um, tá ið tit kortini ikki hava heimild til at herða revsingina?

- Vit hava fingið eina áheitan um at taka málið upp, so tað gera vit. Men tað verður bara til at staðfesta avgerðina, vit longu hava tikið, tí vit hava ikki heimild til nakað annað, leggur hann afturat.

> **Eg havi tað fínt við, at Páll Fangi rør einsamallur á ólavsøku**

Hann er annars ómetaliga harmur um gongdina í málinum og um hóttanina frá 11 seksmannaførum um at boykotta ólavsøkuna.

Men hann tekur tað ikki sum forfylging ella sum eina misálitisváttan, leggur hann afturat og hann ætlar sær so ikki at leggja frá sær av hesi orsøk og tað væntar hann heldur ikki, at nakar av hinum nevndarlimunum fer at gera.